# Við bussi inn í sjónleikin

**Í annaðkvøld fer Bárður Persson – ikki á pall - men upp í ein buss við einmansleikinum »Náttin áðrenn skógin«.**

SJÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Leikurin snýr seg um fremmandagering, har tann navnleysi høvuðspersónurin ongastaðni kennir seg heima. Hann er arbeiðsleysur í einum landi, hann júst er fluttur til, og tí er hansarsa einasti samleiki, at hann er »arbeiðari«, fremmandaarbeiðari.

Tað var stjórin á Tjóðpalli Føroya, Jenny Petersen, ið fekk hugskotið at spæla hendan leikin í einum bussi. Hetta er ongantíð roynt áður, hóast leikurin er framførdur nógvastaðni. Tjóðpallurin lænti tí ein býbuss til sýningarnar.

Fransmaðurin Koltés skirvaði leikin í 1976. Í leikritinum verður einki sagt um, hvør persónurin er, hvar hann er staddur, ella hvønn hann tosar við. Tað verður alt latið upp í hendurnar á leikara og leikstjóra.

Frá Tjóðpallinum verður sagt, at hugskotið at spæla leikin í einum bussi komst av, at tað er júst á einum slíkum almennum staði, tú kanst fáa eitt sindur av innliti í tankarnar hjá persóninum, tú annars ongantíð hevði funnið upp á at sett teg í samband við. Øll hava roynt tað onkuntíð, siga tey á Tjóðpallinum: maðurin í bussinum, sum ikki kann lata vera við at tosa, og øll hini, sum ikki kunnu lata vera við at lurta – tí hesin maðurin hevur sínar tankar og dreymar. Áskoðarin sleppur sostatt so at siga at »lúra«.

Bussurin tekur fólk upp í Steinatúni í Havn, og sían verður koyrt runt í býnum tann góða tíman, leikurin varir.

Bárður Persson hevur sjálvur týtt »Náttin áðrenn skógin«, og Hans Tórgarð leikstjórnar. Leikurin verður framførdur til 15. juli.



*»Náttin áðrenn skógin« er ikki bara ein ferð inn í sinnið á einum navnleysum, fremmandum arbeiðara – hon er eisini ein heldur óvanlig ferð við bussi, har sjálvur sjónleikurin fær ein øðrvísi leiklut enn vant.*
*Mynd: Sunva Lassen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í ein strúk. Sum frálíður regn ella mjørki og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, týsdagin minni vindur. Sirm ella mjørki av og á, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 12 og 16 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | -- |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 28 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1018 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og viknar. Eitt lágtrýst, 1006 hPa. vestan fyri Írland fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/6 kl. $06^{00}$ – 20/6. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,0°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/6 kl. $06^{00}$– 20/6 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

22. juni Fyrra kvarter
24. juni Mánin longst frá jørðini
30. juni Fullmáni
9. juli Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. Juni | 05.46 | 18.04 | 04.46 | 17.04 | 05.01 | 17.19 | 07.46 | 20.04 | 08.46 | 21.04 | 04.01 | 16.19 | 03.01 | 15.19 | 06.01 | 18.19 | 07.01 | 19.19 | 05.31 | 17.49 | 06.46 | 19.04 |
| 29. Juni | 06.22 | 18.47 | 05.22 | 17.47 | 05.37 | 18.02 | 08.22 | 20.47 | 09.22 | 21.47 | 04.37 | 17.02 | 03.37 | 16.02 | 06.37 | 19.02 | 07.37 | 20.02 | 06.07 | 18.32 | 07.22 | 19.47 |
| 30. Juni | 07.13 | 19.41 | 06.13 | 18.41 | 06.28 | 18.56 | 09.13 | 21.41 | 10.13 | 22.41 | 05.28 | 17.56 | 04.28 | 16.56 | 07.28 | 19.56 | 08.28 | 20.56 | 06.58 | 19.26 | 08.13 | 20.41 |
| 1. juli | 08.09 | 20.33 | 07.09 | 19.33 | 07.24 | 19.48 | 10.09 | 22.33 | 11.09 | 23.33 | 06.24 | 18.48 | 05.24 | 17.48 | 08.24 | 20.48 | 09.24 | 21.48 | 07.54 | 20.18 | 09.09 | 21.33 |
| 2. Juli | 08.58 | 21.21 | 07.58 | 20.21 | 08.13 | 20.36 | 10.58 | 23.21 | 11.58 | - | 07.13 | 19.36 | 06.13 | 18.36 | 09.13 | 21.36 | 10.13 | 22.36 | 08.43 | 21.06 | 09.58 | 22.21 |

Lesið Sosialin

Lesið internet Sosialin !

